# Chrysler og Ssangyong



*Amerikanski luksusbilurin Chrysler 300C við 3.0 litra V6 dieselmotori við 218HK*




*Ssangyong Kyron II Spirit 2,7XDi er ein sera væl útgjørdur SUV*

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Chrysler 300 og Ssangyong Kyron - annar ein luksus limousina og hin ein væl útgjørdur SUV**

BILAR

Fyrri bilurin sum varð royndarkoyrdur var amerikanski luksusbilurin Chrysler 300C, sum er ein heppin blandingur av Mercedes-Benz og Chrysler. Bilurin sum varð royndarkoyrdur var ein 3.0 litra V6 diesel við 218HK og botntrekki upp á 510 Nm.

Chrysler 300C fæst eisini sum 300C Touring (stationcar). Sedan kostar 580.000 og Touring kostar 610.000 túsund. Chrysler 300C fæst í fleiri øðrum útgávum sum t.d. HEMI við 340HK.

Bilurin var sera væl útgjørdur vðt.d. leðursetrum við el-stilling og memory funktiónum framman, síðuspeglum sum stilla seg sjálvi tá bilurin bakkar og rattið kann stillast allar vegir elektroniskt. Umframt at hann hevur allar tær framkomnu trygdarskipanirnar innbygdar.

Chrysler 300 kann síggjast og roynast hjá Ivan Johansen Bilum við Hoyvíksvegin.

## Ssangyong Kyron

Seinni bilurin varð ein Ssangyong Kyron II, ein sonevndur SUV (Sport Utility Vehicle). Talan er um ein sera væl útgjørdan og arbeiðsligan 4x4 við liðiligari og praktiskari innrætting.

Bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein Kyron II Spirit 2,7XDi við 2.7 litra (5 syl.) commonrail dieselmotori við 165 hk snúningsmomenti upp á 340 Nm og automatiskum t-tronic girum. Umframt tað fæst Kyron II eisini við 2.0 litra commonrail dieselmotori við 141 hk.

Kyron II hevur sum nakað nýtt hita í baksetrunum, heilautomatiska klimaskipan og el-førarasetur við memory, umframt bakkisensor og elsóltak. Eisini hevði royndarkoyrdi bilurin leðursetur. Umframt tær vanligu trygdarskipanirnar hevði bilurin BAS (Brake Assist System), ARP (Active Rollover Protection) og HDC (Hill Descent Control).

Ssangyong Kyron II Spirit kostar kr. 419.000 sum persónbilur og 321.800 sum vørubilur. Bilurin kann síggjast og roynast hjá Bilverkstaðnum v.Hans J. Kollsker á Hjalla.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælarar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, Sofus Hansen, bilbyggjari, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

mg

---

# Til Kuba at koyra motorsúkklu

**Í februar 2008 verður skipað fyri einum motorsúkklutúri til Kuba. Tað eru MC-travel.dk og HD.fo sum skipa fyri túrinum, har fýra av teimum 40 luttakarunum eru føroyingar**

MC



*Fýra motorsúkklur eru sendar úr Føroyum til at luttaka á einum motorsúkklutúri á Kuba í feburar*



*Kuba er ein sermerkt uppliving, og ferðslan er ein søga fyri seg*

Í seinastu viku vórðu fýra motorsúkklur, sum skulu luttaka á einum motorsúkklutúri á Kuba í feburar, sendar av landinum. Motorsúkklurnar fóru úr Havn via Hamborg til Århus í Danmark og síðan til Antwerpen í Hálandi og harfrá víðari við skipi yvir um hav og vera í Kuba 7. februar 2008, 10 dagar áðrenn ferðalagið kemur til Kuba.

Ferðalagið telur tilsamans 40 persónar á 35 motorsúkklum. Luttakararnir eru úr hesum londum: Føroyum, Týsklandi, Danmark og Svøríki. Teir fýra luttakararnir úr Føroyum eru: Niels Pauli Hjaltalin, Fróði Magnussen, Gunnar Toftegaard og Ove Ritter. Talan er um ein 16 daga rundtúr á Kuba og Trinidad sum MC-travel og HD.fo skipa fyri.

Ove Ritter frá HD.fo sigur, at hóast meginparturin av súkklunum, sum eru tilmeldaðar, eru Harley Davidson, eru øll sløg av motorsúkklum eru sjálvandi vælkomin at luttaka.

Kuba er ein sermerkt uppliving, og ferðslan er ein søga fyri seg. Ikki minst gomlu amerikonsku bilarnir frá 50-unum seta sín serliga dám á ferðsluna. Kubanar eru sera avslappaðir, vinarligir og lættir at koma í samband við, sigur Ove Ritter frá HD.fo, sum longu nú er í ferð við at leggja ein motorsúkklutúr til Suðurafrika í november 2008 til rættis, umframt ein annan túr til Kuba í 2009.

**mg**